Almannamálaráðið

Løgtingið

Dagfesting:	29. september 2020
Mál nr.:	20/00794
Málsviðgjørt:	BÁT
Eftirkannað:	24. september 2020

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar (Útsetan av javning)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar
(Útsetan av javning)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 64 frá 30. apríl 2018 um javningarprosent til almannaveitingar, verður í § 3 sum stk. 2 sett:
"*Stk. 2*. Javnað verður fyrstu ferð 1. januar 2022."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri javning av veitingum frá og við januar 2021.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Uppskotið er liður í ætlanini hjá landsstýrinum at tálma útreiðslunum á fíggjarlógini fyri 2021.

1.2. Galdandi lóggáva
Lógin um javningarprosent til almannaveitingar bleiv samtykt 30. apríl 2018 við virknað frá 1. januar 2020. Fyrsta javningin av almannaveitingum er tí eftir ætlan frá 1. januar 2021.

Sambært lógini verða almannaveitingar javnaðar árliga eftir einum føstum leisti. Javnað verður árliga við miðal av prís- og lønarvøkstri undanfarna árið.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at útseta javningina av almannaveitingum frá 1. januar 2021 til 1. januar 2022, t.v.s. í 1 ár.

Javningin kostar í 2021 uml. 9,5 mió. kr. fyri hvørt prosentið, ið javnað verður. Talvan niðanfyri vísir, hvussu nógv einstaka veitingin hækkar um mánaðin, um javnað verður við 1 prosenti, og hvat hetta merkir fyri játtanina á fíggjarlógini.

Veitingarslag	**Veitingin hækkar um mánaðin**	**Kostnaður fyri landskassan**
Einkjubarnastyrkur	Uml. 130 kr. pr. barn	19 tús. kr.
Barnapeningur veittur í forskoti	Uml. 130 kr. pr. barn	3 tús. kr.
Stuðul til uppihaldspening	Uml. 5 kr. pr. barn	27 tús. kr.
Barnaískoyti	100 kr. pr. barn	122 tús. kr.
Fólkapensjón	Ógift 77 kr. og gift 61 kr.	6.254 tús. kr.
Hægsta fyritíðarpensjón	Ógift 140 kr. og gift 124 kr.	2.762 tús. kr.
Miðal- og lægsta fyritíðarp.	Ógift 115 kr. og gift 101 kr.	
Viðbót til ávísar pensjonistar	Uml. 6-7 kr.	309 tús. kr.
Tilsamans		**9.496 tús. kr.**

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Samanlagt hevur uppskotið við sær, at javningin av almannaveitingum verður útsett til 2022.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið er eitt fylgilógaruppskot til fíggjarlógaruppskotið fyri 2021, og tað hava ikki verið stundir at sent uppskotið til ummælis.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur. At javningin verður útsett hevur við sær, at almannaveitingar ikki hækka í 2021, og merkir hetta, at útreiðslur landskassans ikki hækka so nógv sum ætlað. Ein javning á t.d. 2 prosent í 2021 merkir ein útreiðsluvøkstur, á § 12 almannamál, á uml. 19 mió. kr.

At viðbótin hjá fólkapensjonistum ikki verður javnað, hevur við sær, at skattainntøkurnar hjá kommununum verða lægri, enn tær annars høvdu verið. Viðbótin hjá fyritíðarpensjonistum er eisini skattskyldug, men hjá einum týðandi parti av fyritíðarpensjonistum er skattskylduga inntøkan so mikið lág, at tey rinda nærum ikki kommunuskatt. Aðrar almannaveitingar, sum eru fevndar av javningarlógini, eru ikki skattskyldugar, og at hesar ikki verða javnaðar, ávirkar sostatt bert í avmarkaðan mun inntøkur hjá kommununum.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar við sær.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur við sær, at fyritíðarpensjón og ymiskur barnastuðul ikki verður javnað í 2021. Heldur ikki fólkapensjónin verður javnað, men hartil er at siga, at Løgtingið hevur samtykt eina munandi hækking í grundupphæddini samstundis sum, at skattafrádráttur til fólkapensjonistar hækkar í 2021.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð javningarprosentið fyri komandi árið í seinasta lagi 1. november. Við uppskotinum verður fyrstu ferð javnað 1. januar 2022.

Til § 2
Lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri javning av veitingum frá og við januar 2020.

Almannamálaráðið, 29. september 2020.

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:

Fylgiskjal 1: Javntekstur